# Kennir onkur nøvnini?



Her er ein mynd av nøkrum av manningini á trolaranum Stella Argus. Myndin er helst tikin nakað eftir kríggið.

Vit kenna okkurt av nøvnunum, men fleiri mangla. Her er tað sum vit vita, f.v.: 1. Tummas Thomassen (Kvívíks Tummas), skipari, 2. Hans Egholm, 3. ókendur (beiggi Wenzel Petersen, búði í Runavík?), 4. ókendur, 5. Djóni Thomassen í Kvívík, 6. Arnold ?, 7. Valdemar ? (úr Nólsoy), 8. Eli ?, 9. ókendur (av Skarvanesi).

Teksturin er skrivaður eftir upplýsingum frá Eli Petersen í Havn sum eigur myndina. Eli kundi hugsað sær at fingið tey røttu nøvnini á monnunum og hvar teir eru frá.

Tá vit hava fingið nøvnini upp á pláss, seta vit myndina aftur í blaðið við røttu nøvnunum. Um onkur kennir menninar, er viðkomandi vælkomin at ringja til á tel. 341844 ella 216135.

## Tøkk



Øllum tykkum mongu, sum við gávum, blómum, fjarritum og á annan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegnum, sum var hildin tann 15. des. 2007 vilja vit takkað hjartaliga.
Eisini vilja vit takka tykkum sum árla á morgni sjálvan silvurbrúdleypsdagin tann 18. des. 2007, vaktu okkum við vøkrum sangi.

Somuleiðis takka vit fyri alla hjálpina vit fingu bæði áðrenn, undir og eftir silvurbrúdleypið.

Takk fyri øll somul.

**Bestu ynskir**
**Poula og Andreas**

# Millumskúlaflokkur í 1946



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin er frá 1946 av fýra næmingum í einum millumskúlaflokki. Teir standa á toftunum av eingilskmannabarakkunum, ið høvdu staðið har sum Tórshavnar Kommunuskúli er í dag.

**Aftara røð f.v.:** John Nolsøe, Vilhjálmur Mohr og Kári Hansen.

**Fremst:** Marius Thomasen

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Marita Arge Magnussen*

## Sandá

*Vetrarnáttin tann vakra um vøtn og fjøll seg leggur*
*fjallatindar vakrir stíga upp móti himnahálvinum*
*mánin undan Kirkjubøreyni nú er komin*
*mánalýsið um bygdina fevnur*

*Áin gjøgnum dalin seg smoyggjur*
*áarløkurin undan helluni við sjóðan kemur*
*móti fossinum leiðin gongur*
*á tromini ketta á vakt stendur*

*Brúsandi fossur vakurleiki hesa nátt*
*brúgvin um ánna bygd og bý bindur saman*
*ljósið frá fossinum eitt vakurleika spæl av*
*skaparans hond*
*Sandá - hesa nátt eg ei gloymi.*

**Steinbjørn Viggosson Olsen**

**Dagurin**

**11. mars. Thala.** Ókend ung genta, sum tíðliga í fornkirkjuni varð tikin av døgum fyri trúgv sína.